# Nytrur í hendi



Nytrur í hendi er eitt gamalt føroyskt barnaspæl. Í toskarhøvdinum eru tvey bein, sum toskurin nýtur at vita, hvønn veg hann vendir. Tá toskarhøvd vórðu kókaði, lógu nytrurnar ofta eftir í pottinum. Tær plagdu børnini at fáa at spæla við. Helst eru fleiri mátar at spæla um nytrurnar, soleiðis, sum frágreitt er niðanfyri, minnist onkur, at tey plagdu at spæla.

Nytrurnar verða býttar millum børnini, so tey fáa líka nógvar hvør. Síðan ræður um at spæla um nytrurnar. Jóna tekur t.d. 4 nytrur í hendurnar, síðan vendir hon sær til næsta barnið, Biritu, ristir hendurnar og sigur hesa rímuna:

Nytur í hendi
hav tú mínar
git so mangar
tú onga letur

Kollgitir Birita, noyðist Jóna at lata Biritu nytrurnar. Gitir Birita 3, skal hon lata Jónu 1 nytru (munin millum gitið og rætta talið).

Síðan fær Birita sær t.d. 2 nytrur í hendurnar, ristir tær og sigur rímuna fyri Leivi... o.s.fr.

Vunnið hevur tann, sum hevur flestar nytrur, tá avtornar. Antin tá onkur hevur vunnið allar nytrurnar, ella um frammanundan verður avgjørt at spæld verða t.d. 5 umfør ella 15 minuttir.

-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o-o

Í heftinum Káta er henda lýsing:

***Nytrur í hendi***

| | |
|---|---|
| Aldursbólkur: | 6-7 ár |
| Luttakaratal: | minst 2 (makað tal) |
| Tilfar: | nytrur |

Luttakararnir eru saman tveir og tveir og býta nytrurnar millum sín. Annar (1) fær sær nakrar nytrur í lógvan og sigur: „Nytrur í hendi“. Hin svarar: „Hav tú mínar“. Tann fyrri sigur so: „Git hvussu mangar fleiri ella færri“. Nú skal hin luttakarin (2) gita, hvussu

nógvar nytrur fyrri luttakarin hevur í lógvanum. Gitir hann rætt, far hann allar nytrurnar, hin hevði í lógvanum. Gitir hann ikki rætt, skal hann bøta við muninum millum tað, sum gitt var og tað, sum í lógvanum var.